umhvørvisstovan

RÚSDREKKASØLA LANDSINS
HOYVÍKSVEGUR 51
POSTBOX 3069
110 TÓRSHAVN
FØROYAR

Argir hin 4. juni 2010
Málsnr.: 09/00066-6
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Eyð Eidesgaard

**Viðvíkjandi: Dagføring av loyvi EB 003**

Í sambandi við at Rúsdrekkasøla Landsins hevur søkt um ískoyti til loyvi EB003, hevur Umhvørvisstovan dagført loyvið, soleiðis at øll ískoyti, sum eru givin síðani seinastu dagføring nú finnast á sama loyvi. Fimm úrdráttir eru komnir afturat í hesum umfarinum.

Síggjast kann tí burtur frá eldri útgávum av loyvi EB 003 og ískoytum.

Vinarliga

Eyð Eidesgaard

Eyð Eidesgaard
Umhvørvisviðgeri

**Avrit:** TAKS, Kvíggjartún 1, Postsmoga 2151, 165 Argir

umhvørvisstovan

RÚSDREKKASØLA LANDSINS
HOYVÍKSVEGUR 51
POSTBOX 3069
110 TÓRSHAVN
FØROYAR

Argir hin 4. juni 2010
Málsnr.: 09/00066-6
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Eyð Eidesgaard

# L O Y V I

Við heimild í grein 3 í løgtingslóg nr. 73 frá 10. mai 1994 um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 15. mai 2007 veitir Umhvørvisstovan við hesum:

**Loyvi nummar**
**EB003**

**Loyvið fevnir um:**

Loyvi at selja og flyta inn mineralvatn og lidnar leskidrykkir í einnýtisíløtum, sum tilskilað

Argir, hin 4. juni 2010

Jóhanna Olsen
Deildarleiðari

/

Eyð Eidesgaard
Umhvørvisviðgeri

# LOYVI AT SELJA OG FLYTA INN ØL, MINERALVATN OG LIDNAR LESKIDRYKKIR Í EINNÝTSLUÍLØTUM

**Loyvishavari**
Vísandi til § 3 í løgtingslóg nr. 73 frá 10. mai 1994 um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 15. mai 2007, umsókn frá 28. oktober 2008 umframt áður givið loyvi og ískoytir til loyvið, hevur Umhvørvisstovan veitt loyvi til:

| Navn, bústaður, telefon og faks hjá persóni virki, felagi ella stovni: |
|---|
| Rúsdrekkasøla Landsins<br>Hoyvíksvegur 51<br>Postboks 3069<br>110 Tórshavn<br>Tlf. 314277<br>Fax 312260<br><br>Kontakt:<br>Rúni Herup Olsen, runi@rusan.fo, tlf. 218500 |

**Úrdráttir og íløt**
Loyvið er givið at selja og flyta inn teir úrdráttir í teimum íløtum, sum eru nevnd í talvuni niðanfyri:

| **Góðkendir úrdráttir:** | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Navn á úrdrátti** | **Slag av úrdrátti** | **Tilfar á ílati** | **Stødd á ílati** | **Merkt (mál)** |
| Strongbow Dry Cider | Cider | Glas | 33 cl | SV, EN |
| Tempt 2 Apple Cider | Cider | Metal | 33 cl | DK |
| Tempt 9 Strawberry / Lime Cider | Cider | Metal | 33 cl | DK |
| Somersby Elderflower Cider | Cider | Metal | 33 cl | DK, EN |
| Somersby Cranberry Cider | Cider | Metal | 33 cl | DK, EN |
| Pilsner Urquell | Øl | Glas | 0,33 l | DK, UK |
| Corona Extra | Øl | Glas | 0,33 l | DK, SE |
| Miller Genuine Draft | Øl | Glas | 0,33 l | DK, UK |
| Grolsch Preminum Lager | Øl | Glas | 0,33 l | UK |
| Hoegaarden witbier | Øl | Glas | 0,75 l | UK, DK |
| Witte Trapist | Øl | Glas | 0,33 l | UK, D |
| Brøckhouse Pilsner | Øl | Glas | 0,50 l | DK |
| Erdinger Weisbier | Øl | Glas | 0,50 l | DK |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Spitfire Ale | Øl | Glas | 0,50 l | UK |
| Duckstein | Øl | Glas | 0,50 l | UK |
| Franziskaner Weissbier | Øl | Glas | 0,50 l | UK |
| o'Hara's celtic stout | Øl | Glas | 0,50 l | UK |
| GB Piney | Øl | Glas | 0,66 l | DK |
| Tiger Beer | Øl | Glas | 0,33 l | DK |
| Brooklyn Lager | Øl | Glas | 0,355 l | DK, UK |
| Newcastle Brown Ale | Øl | Glas | 0,33 l | UK |
| Guinness Draught | Øl | Metal | 0,50 l | UK |
| Kilkenny Draught | Øl | Metal | 0,44 l | UK |
| Stella Artois | Øl | Metal | 0,33 l | UK |
| Grøn Tuborg | Øl | Metal | 0,33 l | DK |
| Carlsberg Pilsner | Øl | Metal | 0,33 l | DK |
| Carlsberg Sort Guld | Øl | Metal | 0,33 l | DK |
| Egils Premium | Øl | Metal | 0,50 l | IS, UK |
| Egils Lite | Øl | Metal | 0,50 l | IS, UK |
| Egils Maltbjór | Øl | Metal | 0,50 l | IS, UK |
| Vifilfell Víking Gyltur | Øl | Metal | 0,33 l | IS, UK |
| Thule Export beer | Øl | Metal | 0,33 l | IS, UK |
| Rekorderlig Passionscider | Cider | Metal | 0,50 l | SE |
| Tuborg Grøn | Øl | Plast | 5 l | DK |
| Jacobsen Dark Lager | Øl | Glas | 75 cl | DK |
| Gourmet Bryggeriet Frosty | Øl | Glas | 33 cl | DK |
| Sapporo | Øl | Glas | 33 cl | UK |
| Tuborg Julebryg | Øl | metal | 33 cl | DK |
| Rekorderlig Skovbær Cider | Cider | metal | 50 cl | SE |
| Rekorderlig Pære Cider | Cider | metal | 50 cl | SE |
| Cult Shaker, cider við 5,4 % vol. alkohol | Cider | Glas | 27,5 cl | DK |
| Franziskaner Dunkel Hefe Weissbier 5,0 % vol. Alkohol | Øl | Glas | 50 cl | DK, D, UK v.m. |
| San Miguel Especial 5,4 % vol. | Øl | Metal | 50 cl | DK, UK, E v.m |
| Grolsch Premium Lager 5,0 % vol. | Øl | Metal | 50 cl | UK, NL v.m. |
| Wells Bombardier 4,3 % vol. | Øl | Metal | 50 cl | UK |
| Somersby Apple Cider 4,7 % vol | Cider | Metal | 33 cl | DK |
| Krusovic Cerné Dark 3,8 % | Øl | Glas | 33 cl | DK, UK v.m. |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Lindemans Kriek 3,5 % | Øl | Glas | 25 cl | DK, UK v.m. |
| London Porter 5,4 % | Øl | Glas | 50 cl | UK |
| Golden Champion 5,0 % | Øl | Glas | 50 cl | UK |
| Organic Cherry 5,1 % | Øl | Glas | 35 cl | UK |
| Belhaven McCallum Stout 4,1 % | Øl | Glas | 35 cl | UK |
| Ørbæk Fynsk Forår 4,8 % | Øl | Glas | 50 cl | DK |
| Svaneke Choko Stout 5,7 % | Øl | Glas | 50 cl | DK |
| Refsvindige Alen o 16 5,7 % | Øl | Glas | 50 cl | DK |
| Westons 1880 Cider 8,2 % | Cider | Glas | 50 cl | UK |
| Erdinger Weissbier, alkoholfri 0,4 % | Øl | Metal | 50 cl | DK, UK, D |
| Budweiser 5 % alc. | Øl | Metal | 473 cl | EN |
| Edelweiss | Øl | Glas | 33 cl | EN |
| Rekorderlig Jordbær/Lime | Cider | Glas | 33 cl | SV, EN |
| Somersby Apple Cider | Cider | Glas | 33 cl | DK |
| Rekorderlig Jordbær/Lime | Cider | Metal | 33 cl | SV, EN |
| Somersby Pear Cider | Cider | Metal | 33 cl | DK, EN |
| Cult Mokai Cider | Cider | Glas | 27,5 cl | DK |
| Fuller's London Pride Ale | Øl | Glas | 50 cl | EN |
| Weston's Premium Cider | Cider | Glas | 56,8 cl | SV, EN |
| Foster's Pilsner | Øl | Glas | 33 cl | SV, EN |

Styttingar fyri á hvørjum máli ílatið er merkt: DK=donskum, UK=enskum, SE=svenskum, IS=íslendskum, D=týskum, E=sponskum, NL=hollendskum

**Treytir**

- Loyvishavari skal halda ásetingarnar í løgtingslóg nr. nr. 73 frá 10. mai 1994 um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 15. mai 2007, og tær reglur sum verða gjørdar við heimild í hesi lóg.
- Loyvishavari skal framhaldandi skráseta nøgdina av innfluttum, seldum, móttiknum og avhendaðum íløtum, og skulu hesar upplýsingar saman við yvirliti yvir inn- og útgoldið pant, latast loyvismyndugleikanum árliga, tó fyrstu ferð 3 mánaðar eftir at loyvið er givið.
- Loyvishavari skal tola møguligar broytingar í treytunum, um eftirlitsmyndugleikin, grundað á serliga tær upplýsingar, ið loyvishavarin hevur skyldu at lata loyvismyndugleikanum, metir tørv verða á hesum, fyri at pant- og returskipanin skal virka á nøktandi hátt.

**Kunning**

- Avrit av hesum loyvi við hjáløgdum fylgiskjølum verður latið Tollmyndugleikunum.
- Yvirlit yvir loyvishavarar og úrdráttir verður lagt á heimasíðuna hjá loyvismyndugleikanum.
- Loyvið frítekur ikki loyvishavaran fyri at útvega møgulig onnur loyvi ella góðkenningar, ið kravdar eru sambært aðrari lóg.

**Kæruvegleiðing**
Hendan avgerð kann sambært grein 24 í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg kærast til landsstýriskvinnuna við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýriskvinnuna við umhvørvismálum saman við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, loyvið er almannakunngjørt. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

**Hjálagt:** **Fylgiskjal 1**
Løgtingslóg nr. 73 frá 10. mai 1994 um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 15. mai 2007.
**Fylgiskjal 2**
Kunngerð nr. 54 frá 31. mai 2007 um íløt, úrdráttir og pant.

**Avrit:** Taks, Postrúm 2151, FO-165 Argir

umhvørvisstovan

## Fylgiskjal 1

**LØGTINGSLÓG NR. 73 FRÁ 10. MAI 1994 UM ÍLØT TIL ØL, MINERALVATN OG LIDNAR LESKIDRYKKIR, SUM SEINAST BROYTT VIÐ LØGTINGSLÓG NR. 47 FRÁ 15. MAI 2007**

**§ 1.** Henda lóg fevnir um íløt til øl, mineralvatn og aðrar lidnar leskidrykkir.

**§ 2.** [1)] Loyvt er at framleiða, flyta inn og selja tær í § 1 nevndu drykkjuvørur í endurfyllingaríløtum, t.e. íløt, sum eftir nýtslu, skulu endurfyllast, og í einnýtsluíløtum, t.e. íløt, sum eftir nýtslu, skulu verða nýtt til annað endamál enn tað upprunaliga.
*Stk. 2* [2)] [1)]Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð, hvørji íløt og úrdráttir eru fevnd av § 1.

**§ 3.** [2)] [1)] Áðrenn loyvt er at selja og flyta inn tær í § 1 nevndu drykkjuvørur í einnýtsluíløtum, skal søkjast um loyvi frá landsstýrismanninum.
*Stk. 2.* Í umsóknini skal m.a. tilskilast:

1) hvat slag av úrdrátti og ílati tað snýr seg um,
2) hvat framleiðarin ella innflytarin hevur gjørt fyri at tryggja sær, at hann fær tómu íløtini aftur, og
3) til hvønn íløtini verða avhendað, umframt váttan frá móttakara um, at hesi verða endurnýtt.

*Stk. 3.* [1)] Landsstýrismaðurin kann í loyvinum víkja frá treytini um endurnýtslu, um umsøkjari kann skjalprógva, at tað er ógjørligt ella umhvørvisliga ikki ráðiligt at endurnýta viðkomandi íløt.
*Stk. 4.* [1)] Í loyvinum frá landsstýrinum verður m.a útgreinað, hvørjar skrásetingar framleiðari og innflytari skulu gera í sambandi við sølu og móttøku av íløtum, og í hvønn mun hesar skulu latast landsstýrismanninum.
*Stk. 5.* [1)] Innflytari skal vátta fyri tollmyndugleikunum, at loyvi er fingið frá landsstýrismanninum, áðrenn tær í § 1 nevndu drykkjuvørur í einnýtsluíløtum kunnu útflýggjast.
*Stk. 6.* [1)] Landsstýrismaðurin hevur eftirlit við, at ásetingarnar í lógini og reglur, ásettar sambært lógini, verða hildnar.
Landsstýrismaðurin, ella tann myndugleiki, sum hann heimilar, kann frá innflytara, framleiðara ella seljara krevja allar upplýsingar og øll skjøl, ið neyðug eru í sambandi við útinnan av eftirlitinum.
*Stk. 7.* [1)] Um treytirnar í loyvinum ikki verða hildnar, kann loyvið verða tikið aftur, eins og bann kann verða sett framleiðara, innflytara ella seljara fyri sølu av teimum í § 1 nevndu drykkjuvørum og íløtum.
*Stk. 8.* [1)] Fyri viðgerð og avgreiðslu av loyvum eftir stk. 1 verður gjald kravt. Loyvi verður skrivað, tá goldið er.

**§ 4.** [1)] Øll, sum framleiða, innflyta ella selja tær í § 1 nevndu drykkjuvørur og íløt, skulu taka ímóti tómum íløtum av tí slagi, ið tey selja.
*Stk. 2.* [1)] Øll, sum keypa tær í § 1 nevndu drykkjuvørur og íløt, skulu lata tómu íløtini inn aftur til framleiðara, innflytara, heilsølu ella sølustað.
*Stk. 3.* [1)] Við sølu av teimum í § 1 nevndu íløtum skulu bæði framleiðari, innflytari og sølustað

krevja pant. Á sama hátt skulu framleiðari, innflytari og sølustað lata pant, tá nevndu íløt verða móttikin.

*Stk. 4.* [1]Landsstýrimaðurin ásetir í kunngerð støddina á tí panti, ið skal verða kravt ella latið eftir stk. 3. Eisini kann verða ásett, at einki pant skal verða latið í sambandi við proviantering til toll- og avgjaldsfría nýtslu og sølu.

**§ 5.** [1] Framleiðarar, innflytarar og seljarar av teimum í § 1 nevndu drykkjuvørum og íløtum kunnu samskipa og samstarva við annan part um umsitingina av panti, innsavning og avhendan av tómum íløtum.
*Stk. 2.* [1] Samskipan og samstarv eftir stk. 1 er treytað av loyvi frá landsstýrismanninum. Loyvið kann einans verða givið, um mett verður, at møguleikin at fáa tómu íløtini til høldar ikki versnar.

**§ 6.** Brot á hesa lóg verða sektað og hald verður lagt á ólógliga innfluttu ella seldu vøruna í nevndu íløtum. Reglurnar í § 18 og kap. 9 og 10 í løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll verða nýttar samsvarandi.
*Stk. 2.* [1] Feløg v.m. (løgfrøðiligir persónar) koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.
*Stk. 3.* [1] Í reglum, sum eru ásettar við heimild í lógini, kunnu verða ásettar reglur um revsing við bót.

**§ 7.** Henda lóg fær gildi 1. juli 1994. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 79 frá 27. juli 1989 um forboð móti innflutningi og sølu av øli, mineralvatni o.ø. lidnum leskidrykkjum í dósum og eingangsfløskum.

---

[1] Broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 15. mai 2007, har § 2 er soljóðandi:" Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Stk. 2. Samstundis verður danski teksturin settur úr gildi.

[2] Broytt við Ll. nr. 88 frá 04.06.1996

umhvørvisstovan

# Fylgiskjal 2

## Kunngerð nr. 54 frá 31.05.2007 um íløt, úrdráttir og pant

Við heimild § 2, stk. 2 og § 4, stk. 4 í løgtingslóg nr. 73 frá 10. mai 1994 um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir, sum broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 15. mai 2007, verður ásett:

*Íløt*

**§ 1.** Framleiðsla, innflutningur og søla av øli, mineralvatni og lidnum leskidrykkjum í íløtum úr glasi, plasti og metalli, eru fevnd av lógini.

*Úrdráttir*

**§ 2.** Framleiðsla, innflutningur og søla av hesum úrdráttum í teimum í § 1 nevndu íløtum, eru fevnd av lógini:

1) øl
2) mineralvatn
3) kelduvatn
4) vatn
5) sodavatn
6) liðugt blandað saft
7) cider
8) orkudrykkir
9) ítróttadrykkir
10) íste
11) ískaffi
12) punch

*Pant*

**§ 3.** Við sølu og móttøku av íløtum skal verða kravt og latið pant áljóðandi hesar upphæddir:

1) Kr. 1,25 við MVG fyri endurfyllingaríløt, sum rúma 0,5 litrum ella minni.
2) Kr. 3,75 við MVG fyri endurfyllingaríløt, sum rúma meira enn 0,5 litrum
3) Kr. 2,00 við MVG fyri einnýtsluíløt, sum rúma 0,5 litrum ella minni.
4) Kr. 4,00 við MVG fyri einnýtsluíløt, sum rúma meira enn 0,5 litrum

*Stk. 2.* Upphæddirnar í stk. 1 eru minstu upphæddir. Tó skal verða kravd og latin sama upphædd við sølu sum við móttøku av íløtum.

*Proviantering*

**§ 4.** Í sambandi við proviantering til toll- og avgjaldsfría nýtslu og sølu kann pant verða kravt og latið. Í teimum førum, har pant verður kravt og latið, skal tað gerast samsvarandi ásetingunum í § 3.

*Gildiskoma*

**§ 5.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Innlendismálaráðið, 31. mai 2007

**Jacob Vestergaard (sign.)**
Landsstýrismaður

/ Rúni Joensen (sign)